# Grótflutningurin í Leirvík gongur væl

**– Allur grótflutningurin gjøgnum bygdina er skipaður eftir avtalu millum teir, ið flyta grótið og ferðslunevndina hjá Leirvíkar bygdarráði, og hetta hevur eftir umstøðunum gingið væl, sigur Sjúrður Eliasen, bygdarráðsformaður**

*– Eg veit um handan steinin, sum datt av lastbilinum, men annars hava vit ikki havt nógv at fýlst á. Higartil mugu vit siga, at flutningurin eftir umstøðunum hevur gingið væl, sigur Sjúrður Eliasen, bygdarráðsformaður í Leirvík*



GRÓTFLUTNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri datt ein hampiliga stórur steinur av einum lastbili, sum koyrir grót úr tunnilsmunnanum í Leirvík. Steinurin endaði á bygdarvegnum í Leirvík, men elvdi tíbetur ikki til nakran skaða.

Tá ið Sosialurin vitjaði í undirsjóvartunlinum nakað herfyri, fingu vit upplýst, at tunnilsmenninir skjóta einar 2-3 ferðir um samdøgnið, og hvørja ferð skotið verður, er rúgvan av gróti uppí 60 lastbilar!

Meginparturin av grótinum, sum higartil er komið úr tunlinum, er lagt upp í Leirvík, men ein partur er koyrdur av bygdini – og nakað er flutt um Leirvíksfjørð til Klaksvíkar.

### Gingið væl

Sosialurin hevur spurt bygdarráðsformannin í Leirvík, Sjúrð Eliasen, hvussu flutningurin av gróti hevur gingið higartil.

– Vit mugu siga, at tann flutningur, sum verið hevur, sum heild hevur gingið væl. Eg veit um handan steinin, sum datt av lastbilinum, men annars hava vit ikki havt nógv at fýlst á.

Hann sigur, at tað sjálvsagt hevur havt stóran týdning, at meginparturin av grótinum ikki er farin gjøgnum bygdina, men er lagt í rúgvu norðanfyri tunnilsmunnan. Ein annar partur er nýttur til veg norður á Kráartanga.

Sjúrður sigur, at allur grótflutningurin gjøgnum bygdina er skipaður eftir avtalu millum teir, ið flyta grótið og ferðslunevndina hjá Leirvíkar bygdarráð.

– Hetta samstarv hevur gingið væl, sigur hann.

### Á Kráartanga

Bygdarráðsformaðurin sigur, at ein vegur er bygdur gjøgnum fjøruna og norður á Kráartanga, har Leirvíkar bygdarráð hevur samtykt at gera eitt stórt uppland, og fyrst í apríl mánaða verður byrjað at koyra grót norður hagar.

Sjúrður sigur, at kommunan miðjar eftir at fáa eitt uppland á Kráartanga, sum verður einar 14.000 fermetrar stórt.

- Grótið, sum kemur úr undirsjóvartunlinum, verður nýtt til útfylling, og síðan verður stórt grót lagt sum verja, soleiðis at útfyllingin ikki skolar burtur í uppgangi.

Hann vísir á, at grót úr tunlinum eisini verður flutt um Leirvíksfjørð, og síðan verður báturin aftur fyltur í Klaksvík við stórum gróti, sum verður lagt sum verja á Kráartanga.

– Soleiðis kemur báturin at sigla lastaður báðar vegir, sigur Sjúrður.

Hann veit ikki heilt ítøkiliga, hvussu langa tíð, tað kemur at taka at fylla upp á Kráartanga og vil í løtuni ikki geva nakað boð uppá, hvat tað kemur at kosta.

– Men hetta er eitt arbeiði, sum kommunan tekur sær av, sigur hann.

### Stóran týdning

Sjúrður sigur, at upplandið, sum Leirvíkar kommuna fær á Kráartanga, kemur at hava stóran týdning fyri kommununa framyvir.



*– Hevði alt grótið, sum kemur burtur úr tunnilsbyggingini, verið koyrt gjøgnum bygdina, hevði tað verið uppaftur strævnari hjá okkum, sum búgva her, sigur Sjúrður Eliasen*

Grótið, sum verður lagt út, kemur eisini at verða ein lývd fyri havnalagnum í Leirvík, umframt at arbeiðsumstøðurnar hjá skipunum á staðnum verða munandi betraðar.

Spurdur, hvat økið annars skal brúkast til, heldur bygdarráðsformaðurin, at enn er ov tíðliga at siga nakað ítøkiligt um tað.

– Men her verða nógvir møguleikar, og nú vit hava grótið við hondina, er tað av stórum týdningi, at ein stórur partur av hesum kemur bygdini til góðar.

Hann vísir á, at jú meira grót verður lagt í Leirvík, tess minni verður flutningurin gjøgnum bygdina.

– Tað er greitt, at skuldi alt grótið, sum kemur burtur úr tunnilsbyggingini, verið koyrt gjøgnum bygdina, hevði tað verið uppaftur strævnari hjá okkum, sum búgva her, sigur Sjúrður Eliasen, bygdaráðsformaður í Leirvík.

# Foreldur ansa betur eftir børnunum

**Løgreglan í Eysturoy hevur ikki havt nakrar ítøkiligar trupulleikar av tungu ferðsluni í samband við tunnilsbyggingina undir Leirvíksfirði**

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Vit hava merkt, at tunga ferðslan í Eysturoy er nógv økt í samband við tunnilsbyggingina undir Leirvíksfirði, men higartil kunnu vit einki siga um, at alt ikki hevur gingið væl.

Kristian Martin Joensen, sýslumaður í Eysturoy, sigur, at løgreglan eftir førimuni hevur eyguni eftir allari ferðslu, og soleiðis eisini við ferðsluni úr undirsjóvartunlinum.

### Foreldur ansin

– Sum vit hava skilt, er nógv av grótinum higartil lagt í Leirvík, men nakað av koyring hevur verið til Fuglafjarðar og nú til Runvíkar.

Hann vísir á, at løgreglan ikki hevur verið innblandað í koyringina, men á fólki, sum búgva við vegin í Leirvík, har ferðslan av bygdini gongur, skilst, at foreldur á leiðini hava ansað betur eftir børnunum.

– Eg havi skilt, at tá ið ferðslan er uppá tað mesta, hava foreldrini havt tey smærru børnini við hús.

### Førarin ábyrgd

Kristian Martin vísir á, at tað er lastbilførarin, sum hevur ábyrgdina av, at bilurin, hann koyrir, er forsvarliga lastaður, so grót ikki dettur av. Hann hevur eisini ábyrgdina av, at bilurin er í nøktandi standi.

– Hetta er eitt arbeiði, sum gongur yvir langa tíð, og tí fara vit sjálvsagt at hava eyguni eftir tungu ferðsluni eins og aðrari ferðslu, sigur sýslumaðurin í Eysturoy.

VARPIÐ
Skráir og ummælir
16 síður
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2



# So koyrir føroyski virðisbrævamarknaðurin

**Eitt nýtt tíðarskeið byrjaði í føroyskari fíggjarsøgu, tá Virðisbrævamarknaður Føroya (VMF) á Hafnia týsmorgunin skrivaði undir samstarvsavtalu við Kauphøll Íslands, ISEX. Føroyskar fyritøkur kunnu nú skráseta seg á nýggja, føroyska virðisbrævamarknaðinum, og stigtakararnir Sigurd Poulsen og Marner Jacobsen meta talan vera um stórt framstig, sum í seinasta enda kann skapa búskaparvøkst**



*- Vit, sum hava arbeitt við hesi verkætlan síðani 1997, meta ein virknan virðisbrævamarknað sum týðandi fortreyt fyri at einskilja almennar fyritøkur og skapa vøkstur í búskapinum, sigur VMF stjórin Sigurd Poulsen. Her undirskrivar hann høgrumegin samstarvsavtalu við Kauphøll Íslands á Hafnia týsmorgunin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

VIRÐISBRÆVA-MARKNAÐUR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Eftir fyrireikingar síðani 1997 er endalig samstarvsavtala nú fingin í lag millum Virðisbrævamarknað Føroya (VMF) og Kauphøll Íslands, ICEX. Føroysk virðisbrøv kunnu nú verða skrásett í handilsskipanini Saxess, og er talan um somu skipan, sum hinir norðurlendsku virðisbrævamarknaðirnir nýta í Norex samstarvinum. Sostatt kunnu føroyskar fyritøkur nú skráseta seg á føroyska virðisbrævamarknaðinum, og letur hetta upp nýggjar møguleikar í føroyska vinnulívinum.

### Einskiljingar á veg

Stjórin í VMF er Sigurd Poulsen, og hann gav á tíðindafundinum týsmorgunin til kennar, at hann er glaður fyri nýggju samstarvsavtaluna.

– Vit, sum hava arbeitt við hesi verkætlan síðani 1997, meta ein virknan virðisbrævamarknað sum týðandi fortreyt fyri at einskilja almennar fyritøkur og skapa vøkstur í búskapinum. Fyritøkum í Føroyum tørvar vágafúsan kapital til at menna og styrkja seg, og ein virkin marknaður ger hetta møguligt, sigur Sigurd Poulsen.

Ein høvuðsavleiðing av nýggja føroyska virðisbrævamarknaðinum er júst hetta, at gongd kann koma á nógv umstríddu einskiljingarnar, og umframt Sigurd Poulsen segði Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa og nevndarlimur í VMF, at marknaðurin kann vera eitt einskiljingaramboð hjá tí almenna.

### VMF skapar búskaparvøkst

Marner Jacobsen, sum eisini helt fyrilestur týsmorgunin, heldur talan vera um eitt stórt framstig á føroyska vinnuøkinum.

– Virðisbrævamarknaður Føroya kann geva føroyskum fyritøkum betri møguleikar og í seinasta enda føra til størri búskaparligan vøkstur, tí gjøgnum VMF fáa fyritøkur í Føroyum uttan iva léttari atgongd til kapital - bæði partapening og aðra fígging, sigur Marner Jacobsen. Hann vísir á, at hetta skapar fyritøkunum virkis- og vakstrarmøguleikar, og úrslitið kann gerast størri búskaparligur vøkstur í landinum uppá sikt.

Marner Jacobsen legði í framløgu síni dent á, at endamálið er at skapa meirvirði fyri áhugabólkar og samfelagið sum heild við stovnan og viðlíkahaldi av einum marknaði fyri føroysk partabrøv, lánsbrøv, íløgufeløg o.s.fr. Sambært Marner eru lunnar nú lagdar undir eitt langtíðarsamstarv við íslendska samstarvsfelagan ICEX, og lagt varð afturat, at VMF kemur inn sum partaeigari í ICEX, so samstarv verður á jøvnum føti. VMF gerst partaeigari við 5,6% av partapeninginum.

### Harðar treytir

Stjórin Sigurd Poulsen vísir á, at ein og hvør fyritøka kann ikki skrásetast á virðisbrævamarknaðinum.

– Stór krøv verða sett til fyritøkurnar, sum ynskja at skráseta seg á marknaðinum, so trygd verður veitt íleggjarunum. M.a. skal roknskapurin seinastu trý árini síggja væl út, sigur Sigurd Poulsen. Hann vísir á, at hetta er ikki heilt nýtt fyri allar fyritøkur í landinum, og m.a. arbeiða peningastovnarnir undir líknandi umstøðum.

Avtalan ásetur ítøkiligu treytirnar fyri at skráseta og handla føroysk virðisbrøv og arbeiðs- og inntøkubýtið millum VMF og ISEX. Sambært Marner Jacobsen eru avleiðingarnar m.a., at tað verður léttari at gerast partaeigari í føroyskari fyritøku, men at tað eisini verður léttari at koma burturúr aftur. Umframt hetta verður eisini léttari og smidligari at selja føroysk lánsbrøv og íløguprógv, og fáa fyritøkur við marknaðinum betri atgongd til partapening og lánkapital. Seinastu ávístu avleiðingarnar av stigtakarunum eru, at fyritøkur fáa betri møguleikar at víðka um virksemið í og uttanfyri Føroyar, meðan eigaraskifti í føroyska vinnulívinum eisini kunnu fremjast skjótari og léttari.

### Áhugaðar fyritøkur

Sigurd Poulsen vísir at enda á, at føroyskar fyritøkur longu hava víst áhuga at skrásetast, og higartil er ein einstøk fyritøka, sum í ár er til reiðar at skrásetast á føroyska virðisbrævamarknaðinum, meðan aðrar væntandi koma seinni. Upplýst verður ikki frá VMF, hvørjar hesar fyritøkur eru.

Á fundinum varð heimasíðan www.vmf.fo eisini framløgd av skrivaranum Hans Ellefsen, meðan Thórdur Friðjónsson, stjóri í Kauphøll Íslands, og Bjarni Ármannsson, nevndarformaður í Kauphøll Íslands, skrivaðu undir avtaluna og ynsktu føroyingum góða eydnu.



*- Virðisbrævamarknaður Føroya kann geva føroyskum fyritøkum betri møguleikar og í seinasta enda føra til størri búskaparligan vøkstur, segði nevndarlimurin í VMF og forstjórin í Føroya Sparikassa, Marner Jacobsen, tá hann týsmorgunin hevði stutta framløgu á Hafnia*
*Mynd: Álvur Haraldsen*